# Álit

# í

**løgtingsmáli nr. 91/2023: Uppskot til løgtingslóg um pantskipan fyri íløt**

Landsstýriskvinnan í umhvørvismálum, Ingilín D. Strøm, hevur lagt málið fram tann 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð tann 18. mars 2024 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 3., 16. og 19. apríl og 2. mai 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við IRF, Føroya Bjór, Handilsvinnufelagið, TAKS, Ruth Vang, landsstýriskvinnu í fíggjarmálum, og Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinnu í umhvørvismálum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Hervør Pálsdóttir, Kristianna Winther Poulsen, Kim Durhuus, Henrik Old, Helgi Abrahamsen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Í mong ár hevur verið arbeitt við at gera eina felags pantskipan fyri alt landið, sum er løtt og smidlig fyri brúkaran og handilslívið. Tað hava verið avbjóðingar hjá brúkarum at sleppa av við pantfløskur. Hetta kemst av, at vit hava einar 12 ymiskar skipanir, har brúkarin skal lata pantaðar fløskur inn aftur í sama handli, sum tær vórðu keyptar – ella í einum handli, sum selur fløskur frá sama innflytara. Hetta hevur gjørt tað óneyðuga møtimikið at sleppa av við pantáløgdu fløskurnar.

Við hesum uppskotinum fáa vit eina felags pantskipan fyri alt landið, fyri allar handlar og fyri íløt úr glasi, plasti og metalli. At byrja við verður talan um íløt við vørum sum øli, mineralvatni og leskidrykkjum, men uppskotið letur upp fyri, at pant kann leggjast á onnur íløt, t.d. djús, saft, smoothie og most.

Brúkarin sleppur av við øll íløt á einum stað, og harvið er skipanin ein betring fyri brúkaran í mun til núverandi pantskipanir. Somuleiðis verður tað lættari hjá handlunum og krambafólkum. Hóast summir handlar hava automatir, ið taka ímóti pantíløtum, so eru fleiri handlar, ið manuelt taka ímóti pantíløtum og skilja tey. Í dag skulu íløtini skiljast í millum 15 og 18 bólkar. Frameftir verður skilt í tríggjar bólkar; glas, plast og metal. Tískil verður hetta lættari at handfara hjá handlunum, sum eisini sleppa undan uppgávuni at flyta pantíløtini frá handlinum og til IRF. Handilsvinnan ynskir eina góða og lætta loysn fyri brúkaran og handilslívið, og hendan skipanin ger bæði.

IRF fer at virka sum pantumsitari av skipanini. Pantumsitarin hevur ábyrgd av at heinta frá handlum, gjalda handlum pantið og at fáa íløtini til endurnýtslu og endurvinningar. Talan er um eina skipan, ið skal handfara umleið 15 mió. íløt um árið. Íløt hjá Føroya Bjór, sum verða endurnýtt, verða latin teimum aftur, tá tey eru skild; onnur íløt verða seld til endurvinning.

Tað er eyðsæð, at allir handlar ikki eru eins, og at øll støð ikki eru eins. Av tí, at handlar fáa skyldu at taka ímóti øllum íløtum, kann hetta leggja trýst á smærri handlar á smærri plássum. Men í pantskipanini er ætlanin at skráseta, hvussu hvussu nógv pantíløt kunnu vera á goymslu hjá ymsu handlunum, og hvussu títt IRF skal heinta tómu íløtini. Jú smærri handlarnir eru, jú títtari verður

heintað. Harumframt er eisini lagt upp til, at serloysnir kunnu gerast fyri smærri handlar á smærri oyggjum.

Meirilutin í Rættarnevndini heldur, at tað er gott, at tað nú er komið so væl áleiðis at gera eina felags pantskipan. Tað hevur týdning, at vit kunnu fáa eina so góða, lætta og smidliga skipan sum gjørligt – fyri brúkaran, fyri handlarnar og fyri umhvørvið.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur) hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er, at brúkarin skal sleppa av við øll íløt á einum stað. Tað er eitt gott endamál og hevði verið ein lætti fyri øll, tí í dag má í flestu førum koyrast frá handli til handil fyri at sleppa av við øll íløtini. Men við uppskotinum fær landsstýriskvinnan heimild at áleggja pant á nógv fleiri íløt, og hetta hevur við sær, at tað verður enn dýrari hjá fólki at keypa inn.

Ein onnur avleiðing av uppskotinum er økt ferðsla. Bryggjarí og innflytarar koyra í dag til hvønn einstakan handil við vørum og taka pantíløtini við, tá farið verður avstað aftur. Nú skulu hesir bilar koyra tómir heimaftur, og í staðin skal IRF koyrt runt landið at heinta íløt. Hetta elvir til økta ferðslu við tómum bilum og harvið størri $CO_2$ útlát.

Minnilutin heldur, at málið um at gera tað møguligt at sleppa av við øll íløt á einum stað kann náast við at broyta verandi skipan. Trupulleikin kann loysast við at áleggja handlum at taka ímóti øllum íløtum og geva teimum eitt gjald fyri ómakin. Hetta kann eitt nú gerast á tann hátt, at pantið verður 2 kr. fyri ílatið, men at handilin bert skal rinda 1,50 kr., tá ílatið verður latið handlinum aftur. Tá slepst av við alt á einum stað, handilin fær eina inntøku fyri ómakin, vit gera okkum ikki inn á bryggjaríini, og IRF fær framhaldandi øll íløtini.

Lóggáva skal sjálvandi eisini hava vinnulig atlit, men tað heldur minnilutin als ikki, at lógaruppskotið hjá landsstýriskvinnuni hevur. Tvørturímóti er uppskotið steinur oman á byrðu hjá vinnuni.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Rættarnevndin, 2. mai 2024**

| | | |
|---|---|---|
| Hervør Pálsdóttir<br>forkvinna | Helgi Abrahamsen<br>næstformaður | Kristianna W. Poulsen |
| Henrik Old | Kim Durhuus | Steffan Klein Poulsen |

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur